Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin tlf 341800



## Tvingsilssøla

Tvingsilssøla verður av einum egningarskúri á matr. nr. 163 q, Klaksvík:

**Týsdagin tann 23. februar kl. 10.00, í Føroya Fútarætti, C. Pløyensgøta 1, FO-100 Tórshavn.**

Skúrurin stendur á leigaðum øki á havnalagnum í Klaksvík beint við bryggjukantin og er til víddar ca. 40 m² og er gjørdur úr betong. Innan er skúrurin úr timbri og klæddur við gløttum plátum upp til helvtina. Takið er úr jarni.

Stampafrystari hoyrir til skúrin. Eisini er WC í skúrinum.

Ognin verður seld uppá vanligar tvingsilssølutreytir.

Tekna teg sum haldara nú fyri einans

**495,- um ársfjórðingin**

**Sparið 560,- í mun til leysasølu!**



nær sum helst, hvar sum helst

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent óፊpostað. Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn:

Bústaður:

Bygd / býur:

Telefon:

Undirskrift:

Sosialurin Boks 76 · FO-110 Tórshavn

CISV

faroe islands

building global friendship

## Í summar kanst tú søkja um luttøku á hesum legum:

**Village – Barnalega fyri 11 ára gomul**
(Brasilia, Frankaríki, Spania og Italia)

**Summer Camp**
(Italia, 15 ár; Spania, 14 ár)

**Youth Meeting**
(Niðurlond, 12-13 ára gomul)

**Interchange**
(Spania-Føroyar, 12-13 ár)

**Ungleiðari – JC**
(Niðurlond, 16-17 ár)

**Seminar Camp**
(Italia, 17-18 ár)

Eisini verður søkt eftir leiðarum til Village, Summer Camp og Interchange. Hevur hetta tín áhuga, ella hevur tú spurningar, kanst tú skriva til cisv-fo@olivant.fo ella ringja til Anniku á tlf. 22 29 20.

**Freistin at søkja er mánadagin 8. februar 2010.**

## Frá S & K felagnum

Aðalfundur felagsins verður í húsinum hjá S & K felagnum, Traðarvegur 20, Tórshavn, leygardagin, 20. februar 2010 kl. 19:00

Dagsskrá sambart lógum felagsins

1. Frásøgn formansins frá farna ári.
2. Roknskapur til góðkenningar.
3. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum.
4. Val av formanni.
5. Innkomin uppskot.
6. Ymiskt.

Limir felagsins kunnu seta fram uppskot til viðgerðar á aðalfundinum, soleiðis at hesi mál skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundurin verður hildin.

Felagið bjóðar til ábit eftir aðalfundin og Hilmar Jan Hansen kemur at undirhalda

**Nevndin í S & K felagnum**

# LEIÐARI
## til Føroya Barnaheim

**Søkt verður eftir leiðara til Føroya Barnaheim at byrja 1. mars 2010 ella skjótast tilber.**

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur. Stovnurin hevur í dag eina deild, Ungdómsdeildina, sum kann hýsa 6 børnum. Harafturat er eitt bráðfeingispláss. Deildin hevur 8,5 fulltíðarstørv. Ætlandi verða broytingar gjørdar í næstum, sum kunnu hava við sær økt barnatal og tal á starvsfólki.

Endamálið við arbeiðinum á Ungdómsdeildini er fyrst og fremst at geva børnunum/teimum ungu umsorgan og tryggleika, samstundis sum dentur verður lagdur á at vísa á týdningin av gevandi og mennandi samveru. Hetta verður gjørt við einum skipaðum og viðkomandi gerandisdegi við áhuga og nærleika, við serligum átøkum, og ikki minst við regluligum samrøðum og øðrum uppbyggjandi samskifti. Tað er greitt mál hjá Ungdómsdeildini at hava gott samstarv við foreldur og játtandi myndugleikar, umframt aðrar viðkomandi starvsbólkar og stovnar.

Leiðarin hevur fakligu, fyrsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góð leiðara- og samstarvsevni, hevur áræði og dugir at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri brúkarar og starvsfólk.

Til starvið krevst útbúgving sum námsfrøðingur ella onnur líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

Starvið verður lønt smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Fríðu Patursson, stýrisfm. á tlf. 224969.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 18. februar 2010.

**Føroya Barnaheim, stýrið**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

# Gimbrastova ???

**www.ognir.fo**

## Frá Vága Handverkarafelag

Ársaðalfundurin verður í húsinum í Miðvági hósdagin 18. februar 2010 kl. 19.30.

Skrá smb. lóg felagsins.

**Nevndin fyri Vága Handverkarafelag**

Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur ½ tíma seinni.